NÆMINGAR





## Samstarv, styrki og stríðsvilji

Maibritt er nýkosin Føroyameistari í fimleiki og næmingur í Føroya Sparikassa. Fyri Maibritt er umráðandi við avbjóðingum í dagligdegnum, bæði í arbeiðnum og í frítíðini; tí hevur hon valt at læra í Sparikassanum. Sum næmingur í Sparikassanum er Maibritt eisini partur av einum liði og fær mýkt samstarvsvøddarnar, samstundis sum hon fær íblástur og yvirskot til eina virkna frítíð.

Vit sóknast eftir lívligum og óhátíðarligum persónum, sum eru eldhugaðir liðleikarar og sum ikki eru bangnir fyri einum krevjandi og avbjóðandi arbeiðsdegi. Vit leggja dent á opið og erligt prátingarlag, ið mennir ein felagshugburð millum starvsfólk og kundar.

Sum næmingur í Sparikassanum fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og kundatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og fyritøkum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit søkja næmingar, sum ætlandi fara at arbeiða á deildum okkara í Vágum, Vestmanna, Kollafirði, Gøtu, Klaksvík á Strondum, Norðskála og í Havn.

Í næmingatíðini ert tú við í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka próvgv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tlf. 348510, teldupost marjun.eystberg@sparikassin.fo

Send umsóknina við avriti av próvskjølum til adressuna, nevnda niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 26. mai 2006.

Føroya Sparikassi
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 214 fólk. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið Inni og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI

VASTI 459010



# Vit eru flutt á Skarðshjalla

## Stórt úrval av natúr havamøblum

o.a. til havan: granitt · marmor











Opið hvønn dag frá kl. 13.00 - 17.30
Leygardag frá kl. 10.00 - 14.00

Leygardagin 13. mai tó opið til kl. 17.00

**Sp/f Henning Sørensen**
Tel. 314 783
Fartel. 218 931
Fax 319 931

Sosialurin 341800